# Feløg taka lógvatak um



**– Vit eru ein lutfalsliga lítil bygd, og tí er tað gleðiligt og neyðugt, at vit kunnu vera saman um eitt so stórt tiltak, sum sundalagsstevnan er, sigur Sonni Samuelsen, formaður í Róðrarfelagnum í Hósvík**

SUNDALAGSSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sundalagsstevna er á hvørjum ári. Hon skiftir millum bygdirnar Hvalvík, Hósvík og Kollafjørð, og í ár eru tað hósvíkingar, sum eiga tørn at skipa fyri.

Bygdirnar, sum eru vertir, skipa fyri stevnuni, og vanliga eru tað feløg í bygdunum, ið taka sær av fyrireikingunum og syrgja fyri, at alt kemur upp á pláss og fer fram á besta hátt.

Feløgini, sum taka sær av sundalagsstevnuni í ár, eru soleiðis Róðrarfelagið í Hósvík og Bygdarfelagið Varðin.

Eingin serstøk stevnunevnd er skipað, men tað eru nevndirnar aftanfyri hesi bæði feløgini, sum saman við góðum stuðlum í bygdini taka sær av stevnuni.

## Gott samstarv

Samstarvið millum Bygdarfelagið Varðan við Duritu Danielsen sum forkvinnu og Róðrarfelagið í Hósvík við Sonna Samuelsen sum formanni er gott.

- Vit eru ein lutfalsliga lítil bygd, og tí er tað gleðiligt og neyðugt, at samanhald merkir eitt slíkt tiltak, sum sundalagsstevnan er.

Tað sigur Sonni Samuelsen, sum vit tosaðu við fyrr í vikuni, eftir at fyrireikingar og stevnuskrá vóru komin undir land.

- Vit royna at halda fast um, at sundalagsstevnan er um hesa tíðina í juni, og tað merkir, at hon vanliga liggur næst í røðini eftir norðoyastevnu, sum er ársins fyrsta summarstevna, har skotið verður fyri fyrsta FM-kappróðrinum.

Hann sigur, at nevndirnar í báðum feløgunum hava havt fleiri fundir undan stevnuni, og síðan eru ymisku uppgávurnar býttar millum nevndirnar og onnur, sum plaga at hjálpa til við fyrireikingunum.

## Góðar veðurvánir

- Okkara felag tekur sær í fyrsta lagi av tí, sum hevur við kappróðurin at gera, meðan bygdarfelagið kanska serliga tekur sær av ymisku tiltøkunum í bygdarhúsinum og øðrum tiltøkum á stevnuni.

Hann sigur, at tá stevnan byrjar, eru eini 50-60 fólk beinleiðis knýtt at ymisku tiltøkunum, og í aðrar mátar luttekur stórur partur av bygdini á ymiskan hátt, tí uppgávurnar eru nógvar.

– Alt bendir á, at vit verða rímiliga heppin við veðrinum. Hann sigur høgætt, norðan og landnyrðing, einar 5-10 m/sek. og turt veður. Longu nú er hann høgur í ættini, so vit kunnu siga, at hann er komin í "leguna", sum helst fer at halda sær rundan um stevnudagarnar.

Sonni vísir á, at veðrið hevur so ómetaliga nógv at siga á eini slíkari stevnu, har nógv tiltøk – og í fyrsta lagi kappróðurin - eru uttandura, men eisini hoppiborg og annað til børn og ungdóm.

– Burtursæð frá vindinum, sum var fyrst í hesi vikuni, hevur veðrið leingi verið so ómetaliga gott, og vit í Hósvík vóna, at "kvotan" fyri summarið ikki er uppi enn, sigur hann brosandi.

## FM-stigini rulla

Hæddarpunktið á sundalagsstevnu er kappróðurin, sum telir við í FM-kappingini, ið byrjaði á norðoyastevnu.

– Vit ganga høgt uppí, at kappróðurin gongur væl, og seinastu árini hava vit fingið tað skoðsmál, at kappróðurin, sum vit skipa fyri, er fyrimyndarligur. Vit gera alt fyri, at soleiðis eisini verður á stevnuni hesaferð.

Sonni sigur, at felagið sendir kunningarbrøv út til róðrarfeløg og høvuðsdómarar fyri at tryggja sær, at alt er, sum tað skal vera.

– Ein fyrimunur hjá okkum er, at fleiri, sum standa aftanfyri kappróðurin í Hósvík, eru tey somu gjøgnum fleiri ár. Hetta eru roynd fólk á sínum øki, sum kenna sína uppgávu, tá alt skal sampakka undir róðrinum.

Á sundalagsstevnu í Hósvík byrja róðrarnir eysturi móti Veðranesi, og síðan verður róð




*Fleiri av stevnutiltøkunum verða í bygdarhúsinum. Tað er eisini her, at dansur verður fyri teimum ungu fríggjakvøldið – og fyri teimum tilkomnu leygarkvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*